gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Ynskini parvíst gingin á møti

Danska stjórnin hevur um síður svarað landsstýrinum um ynski landsstýrisins at lækka heildarveitingina – blokkin – 350 milliónir krónur næsta ár og yvirtaka málsøki skúla- og almannamál frá 1. januar 2002.

Stjórnin er sinnað at samráðast um ætlaðu yvirtøkurnar, og ráðharrarnir í hesum málum eru bidnir at seta seg í samband við landsstýrið um hesar samráðingarnar. Harafturat er stjórnin sinnað at lækka heildarveitingina, men við fyrivarnm.

Tað merkir, at í høvuðsheitum gongur stjórnin ynskjum landsstýrisins á møti, men einki verður nevnt um ynski løgmans um beinleiðis samráðingar við forsætisráðharran um búskaparspurningin ella blokkin. Við øðrum orðum er líkt til, at Poul Nyrup Rasmussen ikki er sinnaður at tosa við Anfinn Kalsberg um tann meiri yvirskipaða politikkin. Líka mikið um tikið verður undir við politikki landsstýrisins ella eið, er vanlig fatan, at sjálvandi eigur forsætismálaráðharrin at ganga einum slíkum ynski frá løgmanni á møti.

Víst er stjórnin sinnað at lækka blokkin í útgangsstøði, men samráðingarnar á skúla- og almannaøkinum skulu vísa, um tað er ráðiligt at lækka blokkin so nógv, og um føroyingar veruliga eru førir fyri at átaka hesi málsøki, sum vit annars hava umsitið seinastu fjórðingsøldina meira og minni.

Hetta vísir eina heldur yvirlegna áskoðan hjá donsku stjórnini, sum eisini kom til sjóndar í samrøðuni, Útvarpið hevði við Sonju Mikkelsen, framsøgukvinnu hjá sosialdemokratiska flokkinum í føroyskum málum, herfyri. Tá setti hon m.a. spurnartekin við føroyskan skúlaskap og føroyska útbúgvingarskipan, hóast danir eru sigldir afturút á hesum øki samanborið við onnur lond seinastu mongu árini.

Í skrivandi stund er landsstýrið ikki komið við nakrari almennari viðmerking, og nýggjsta skrivið hjá forsætisráðharranum kann tulkast ein og annan veg. Hóast stjórnin er sinað at fáa samráðingarnar frá hondini í ár, so tær kunnu fáa gildi frá 1. januar, ber skrivið eisini brá av, at danska stjórnin óivað bíðar eftir einum vali, sum kann broyta landsstýrissamgonguna.

Um eitt val broytir landstýrissamgonguna ella ikki, kann eisini hugsast, at stjórnin hugsar, at hví skal eitt komandi landsstýrið við øðrum flokkum verða noytt at reka ein politikk, sum grundleggjandi ósemja er um. Aftur eitt úrslit av tí blokkpolitikki í málinum um framtíðarstøðu, sum landsstýrið valdi, og sum kann elva til, at vit ikki koma langt fram á sjálvstýrisleið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKING

# Almanna- og heilsumál, útbúgving og mentan fáa minni í dag enn í 1990

**Hans Pauli Strøm,**
*javnaðartingmaður*



Nú tann asosiali politikkurin hjá fullveldissamgonguni í seinastuni hevur verið fyri stórum ágangi, hevur landsstýrismaðurin í fullveldismálum hildið tað vera neyðugt sjálvur at stíga fram og verja borg. Á sín vanliga smarta máta hevur hann roynt seta tingini uppá pláss við greinini »Minni blokkur – men meira til almanna-, heilsumál, útbúgving og mentan«. Hetta var ein ógviliga áhugaverd grein, tí hon so týðiliga avdúkaði manipulatiónsteknikkin hjá landsstýrismanninum í enn eini roynd at rangsnúgva veruleikan, fyri at fáa tað sum vendir niður at venda upp.

Tíbetur kenna flestøll tann nakna veruleikan um støðuna á almanna- og heilsuøkinum, so greinin man meira skaða trúvirðið hjá landsstýrismanninum enn sannføra fólkið um tann framúrskarandi almanna- og heilsupolitikkin hjá fullveldissamgonguni.

Kritikkin av almanna- og heilsupolitikkinum hjá samgonguni kallar hann »ósannindir«, »rætt og slætt ósatt«, »óetiskt« og »ótespilig propaganda«.

Landsstýrismaðurin roynir so at prógva, at »støðan er júst øvugt« av tí sum kritikkurin sigur. M.a. við at samanbera hvussu nógv varð brúkt av fíggjarlógini til almanna- og heilsumál, útbúgving og mentan í 1990 og 2001, fær landsstýrismaðurin tað til, at ongantíð hevur meira verið brúkt til hesi endamál enn nú. Ja, hann svingar seg enntá upp í ørandi hæddir og proklamerar, at »talan er um eina sanna kollvelting í raðfestingunum á fíggjarlógini«!

Men hvussu er nú vorðið? Tað nyttar jú ikki at samanbera krónuupphæddina á ein fíggjarlógarjáttan í 1990 við 2001, uttan eisini at samanbera við príshækkingina ella inflatiónina í sama tíðarskeiði. Tí mugu vit taka gongdina í prístalinum við, og tað er gjørt í talvuni niðanfyri. (Talva 1)

**Játtanin er minkað í virðið frá 1990 til 2001**

| | 1990 | 2001 | %-vøkstur |
|---|---|---|---|
| Prístalið | 132,5 | 197,5 | 49 |
| Játtan til almanna- og heilsumál, útbúgving og mentan | 1686 | 2126 | 26 |
| Um játtanin skuldi havt sama virði í 2001 sum í 1990 | 1686 | 2514 | 49 |

**Fíggjarlógarjáttanin samanborin við búskaparvøksturin, mió. kr. í ársins virði**

| | 1990 | 2001 | %-vøkstur |
|---|---|---|---|
| Útflutningurin | 2609 | 3892 | 49 |
| Bruttotjóðarúrtøkan | 6197 | 8918 | 44 |
| Almanna- og heilsumál, útbúgving og mentan | 1686 | 2126 | 26 |

Príshækkingin ella inflatiónin hevur sostatt verið upp á 49% í hesum tíðarskeiði, men játtanin til almanna- og heilsumál, útbúgving og mentan hevur ikki fylgt við og er bara økt við 26%. Tí er játtanin til almanna- og heilsumál, útbúgving og mentan í veruleikanum minkað munandi í virði frá 1990 til 2001, og hon skuldi verið 400 mió. kr. størri í dag, fyri at kunna verið á sama støði sum í 1990 (2514 mió.kr. ístaðin fyri 2126).

Vit kunnu eisini samanbera játtanina til almanna- og heilsumál, útbúgving og mentan við búskaparvøksturin í føroyska samfelagnum frá 1990 til 2001, og har brúka tølini fyri útflutningin og bruttotjóðarúrtøkuna: (Talva 2)

Her sæðst, at taka vit hædd fyri inflatiónini, so er støddin á búskapinum, t.d. máld sum BTÚ, eru vit nústani komin á støðið sum var í 1990. Men enn er játtanin til almanna- og heilsumál, útbúgving og mentan langt ífrá komin so langt.

Nú veit eg fullvæl, at av tí at ávísur ivi kann vera um okkara gamla prístal, og at tað er óvist um veruliga inflatiónin hevur verið nakað minni ella størri enn prístalið vísir. Tað er tó lítil ivi um, at tey 26%, sum játtanin er økt hesi árini, ikki er nóg mikið fyri at viga upp ímóti teirri virðisminking, sum verið hevur.

Tað sum tó veruliga hevur týdning fyri landsins borgarar, um vit skulu meta um játtanin er nøktandi, er spurningurin um hvussu langt játtanin røkkur til tann staðfesta tørvin í samfelagnum. Hetta skal eg venda aftur til í eini seinni grein.




Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



# Løgmaður er fegin



*Løgmaður heldur, at brævið frá Poul Nyrup Rasmussen vísir, at stjórnin viðurkennir fullveldisgongdina hjá landsstýrinum*

**Brævið frá Poul Nyrup Rasmussen er ein viðurkenning av, at stjórnin góðkennir ætlan landsstýrissins, sigur løgmaður**

SJÁLVSTÝRISMÁLIÐ
*John Johannessen/*
*Eirikur Lindenskov*

– Eg eri sera fegin um brævið frá Poul Nyrup Rasmussen, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum í morgun fekk svarið frá forsætismálaráðharranum upp á seinasta útspælið frá landsstýrinum, sum var brævið, ið varð sent forsætismálaráðharranum 31. mai. *(Meira um svarið hjá Poul Nyrup Rasmussen er at lesa á síðu 4).*

Anfinn Kallsberg tulkar svarið frá Poul Nyrup Rasmussen soleiðis, sum at stjórnin nú viðurkennir ætlanirnar hjá landsstýrinum í fullveldisgongdini.

– Hetta er eitt postivt bræv og ein aksept av gongdini, sigur løgmaður.

Løgmaður heldur tí, at tað er í fínasta lagi, at samráðast nú skal beinleiðis við donsku ráðharrarnar, sum hava ábyrgdina av málsøkjunum. Í sambandi við, at stjórnin vil treyta sær, at útrokningarnar hjá landsstýrinum eru rættar, tá tosað verður um at lækka blokkin, heldur løgmaður tað eisini vera náttúrligt.

– Hetta er sjálvandi nakað, vit fara at samskifta um. Sjálvandi kann eisini tað henda, at útrokningarnar fara at vísa eitt annað tal, enn tær 356 milliónirnar, sum vit hava roknað út, at blokkstuðulin skal lækka, sigur løgmaður, sum tó heldur, at tað verður ikki langt av leið.

– Vit hava okkara grundgevingar, og nú fara vit saman við donsku ráðharrunum at hyggja upp á hetta og finna eina semju um, hvat tað er, sum blokkstuðulin í framtíðini skal fevna um, sigur løgmaður.

# Stuðulin til ferðaútreiðslur hækkar

**TÍÐINDASKRIV**
***Fíggjarmálastýrið***

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hækkar nú stuðulin til ferðing á landi millum heimstað og arbeiðspláss úr 9 oyru upp í 37 oyru fyri hvønn kilometur oman fyri 48 kilometrar. Stuðulin til ferðing við Suðuroyarfarleiðini hækkar úr 5 krónum upp í 15 krónur fyri hvønn túr. Hækkingin er galdandi frá 1. januar í ár.

Ferðastuðulin fyri koyring millum heimstað og arbeiðspláss hækkar úr 9 oyru upp í 37 oyru fyri hvønn koyrdan kilometur omanfyri 48 kilometrar. Stuðulin til ferðaútreiðslur hevur higartil verið 37 oyru fyri hvønn kilometur, um koyringin var millum 15 og 48 kilometrar, meðan stuðulin fyri ferðing omanfyri 48 kilometrar hevur verið 9 oyru. Markið upp á 48 kilometrar verður nú tikið av soleiðis, at stuðulin er tann sami fyri allar koyrdar kilometrar oman fyri 15 kilometrar.

Stuðulin til sjóvegis ferðing hevur higartil verið 5 krónur um dagin fyri allar farleiðir. Men Suðuroyarfarleiðin er dýrari enn aðrar sjóvegis farleiðir, og tí hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum gjørt av at hækka hesa upphæddina. Stuðulin til sjóvegis ferðing fæst, óansæð um man ferðast hvønn dag ella um man ferðast frá arbeiðsplássinum fyrst í vikuni og heim aftur seinast í vikuni.

Løgtingið samtykti 22. mars í ár broytingar í løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 1997 um stuðul til ferðaútreiðslur, og broytingarnar gera tað møguligt nú at broyta stuðulsupphæddirnar. Hesar hava higartil verið ásettar við kunngerð nr. 96 frá 16 juni 2000 frá Fíggjarmálastýrinum um stuðul til ferðaútreiðslur og útreiðslur til dupult húsarhald. Tær nýggju upphæddirnar verða ásettar í eini nýggjari kunngerð, sum verður kunngjørd í Kunngerðarblaðnum í komandi viku.

# Full bingja av klæðum frá Reyða Krossi

**Fríggjadagin fór ein 20 fót bingja við 25 rúmmetrum av klæðum frá Reyða Krossi Føroya av landinum**

**Reyða Kross Føroya**
***Súni Vinther, formaður***

Reyði Krossur Føroya sendi fríggjadagin eina 20 fót bingju av góðum og brúktum klæðum við skipi hjá Skipafelagnum Føroyar.

6 – 8 kvinnur, sum í vetur hava savna inn klæðir fyri Reyða Kross Føroya endaðu vetrararbeiði fyri at halda summafrí – samstundis kundi mannliga hjálpin í felagnum stappa umleið 25 rúmmetur af góðum klæðum í bingju, sum nú fer til ein innsavningarmiðdepil hjá Dansk Røde Kors.

Klæðini eru komin úr øllum Føroyum, tó mest úr Vági og Havn.

Klæðini eru øll eftirhugd og pakkað til kyn og stødd-ir. Tað eru rættiliga góð klæði, ið eru send víðari. Klæði, ið ikki eru rein ella við løsti á, verða ikki send av landinum.

Í innsavningarmiðdeplinum verða klæðini flokkað einaferð afturat til heit og køld øki.

Síðan verða tey pakkað nøkulunda, sum vit plagdu at pakka saltfisk, í hessianposa uttan á plastposa sum viga 25 kg hvør. Tá kunnu klæðini kastast úr tokvognum, tyrlum o.s.v. og flytast víðari, sjálvt eingi flutningsfør uttan trillubørður, ásin o. l. eru at taka til.

Reyði Krossur Føroya takkar øllum gevarum og hjálparum, og ikki minst Skipafelagnum Føroyar, sum í meira enn 50 ár hevur flutt klæðir o. a. úr Føroyum til neyðstødd runt um í heiminum – í 1947 fluttu teir saltfisk til Grikkaland, um hetta kann lesast í minnisritinum Reyði Krossur Føroya 1926 – 2001.

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY
2,2 XL AUTOMATIK
Sýnaður 03-00
Skrás.: 07-10-92
Km.: 193.000
Prísur: 72.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA
1,3 TERRA L/B
Skrás.: 30-09-98
Km.: 52.000
Prísur: 109.600,- Garanti**

TOYOTA CAMRY
2,0 XLI AUTOMATIK
Sýnaður 03-01
Skrás.: 23-06-88
Km.: 170.000
Prísur: 39.600,-

TOYOTA COROLLA
1,3 TERRA L/B
Skrás.: 21-11-97
Km.: 65.000
Prísur: 105.600,- Garanti**

TOYOTA CARINA
E 1,6 GXI L/B
Sýnaður 04-00
Skrás.: 09-11-95
Km.: 87.000
Prísur: 103.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA
1,3 H/B 5 HURÐAR
Skrás.: 31-07-97
Km.: 81.000
Prísur: 87.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA
E 1,6 L/B
Sýnaður 03-01
Skrás.: 12-10-95
Km.: 48.000
Prísur: 106.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA
TERRA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 14.000
Prísur: 114.600,- Garanti**

TOYOTA CARINA
E 1,6 SEDAN
Skrás.: 29-03-95
Km.: 107.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA
1,3 XLI
Skrás.: 09-10-95
Km.: 173.000
Prísur: 58.600,-

TOYOTA CARINA
1,6 L/B
Skrás.: 28-03-89
Km.: 165.000
Prísur: 48.600,- Garanti*

FIAT BRAVO
1,4 GT
Skrás.: 07-07-99
Km.: 18.000
Prísur: 118.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA
1,6 GL SEDAN
Skrás.: 09-05-90
Km.: 177.000
Prísur: 48.600,-

HONDA CIVIC
1,4
Skrás.: 13-11-98
Km.: 32.000
Prísur: 97.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA
1,6 XL
Sýnaður 02-00
Skrás.: 10-07-91
Km.: 143.000
Prísur: 45.600,-

MAZDA 626
1,8 i SEDAN
Skrás.: 10-06-96
Km.: 73.000
Prísur: 89.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA
1,6 XL
Skrás.: 10-07-89
Km.:
Prísur: 42.600,-

MAZDA 323
2,0 DIESEL 3 HURÐAR
Skrás.: 01-10-98
Km.: 35.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA
2,0 DIESEL
Skrás.: 12-08-97
Km.: 170.000
Prísur: 105.600,- Garanti*

FORD ESCORT
1,8 TURBO DIESEL
Skrás.: 04-08-97
Km.: 40.000
Prísur: 107.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA
1,6 AUTOM. GEAR
Skrás.: 22-04-99
Km.: 21.000
Prísur: 128.600,- Garanti**

FORD ESCORT
1,8 DIESEL
Sýnaður 06-00
Skrás.: 08-03-94
Km.: 158.000
Prísur: 54.600,-

TOYOTA COROLLA
1,6 TERRA H/B
Skrás.: 15-03-99
Km.: 45.000
Prísur: 107.600,- Garanti**

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

VØRUVOGNAR

MITSUBISHI PAJERO
2,5 VAN
Skrás.: 14-11-97
Km.: 47.000
Prísur: 149.000,- Garanti*

www.reyniservice.fo

STØKK INN Á GÓLVIÐ

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820